## Start spældi væl – men tapti

Norska felagið Start tapti aftur í gjár dyst í norsku tippuliguni. Heimasíðan hjá Start skrivar, at í stórum løtum var spælið hjá Start tað besta, sum liðið hevur víst í hesum kappingarárinum, men tað endaði við, at liðið tapti. Start kom á odda tíðliga í dystinum, men Vålerenga javnaði lítla løtu seinni. Eitt mál kom afturat, og tað fekk Vålerenga. Todi Jónsson var við í álopinum hjá Start allan dystin, og hann spældi væl, hóast hann heldur ikki hesum dystinum fekk sett hol á málskjótingina í ár.



## Todi fær kanska gamlan liðfelaga aftur

Tá ið Start týskvøldið spældi ímóti Vålerenga á heimavølli, var danski álopsspælarin David Nielsen millum áskoðararnar. Fedrelandsvennen skrivar, at David Nielsen er upp á tal sum nýggjur spælari í Start, eftir at sáttmálin millum FC Midtjylland og David Nielsen ikki varð longdur.

– Allir góðir spælarar, sum ikki hava sáttmála, eru aktuellir hjá okkum. Hann er ein av fimm ella seks spælarum, sum vit hava áhuga í beint nú, sigur Trond Are Gjone, ítróttarstjóri í Start, við Fedrelandsvennen.

Todi Jónsson og David Nielsen hava áður verið liðfelagar, tað var fyri fleiri árum síðani í FC Keypmannahavn.

# Stórur áhugi fyri skúlatelving

**100 børn og ung vóru við í fyrru undankappingini til FM-kappingina fyri skúlanæmingar. Sandoyingar møttu mannsterkir við 30 telvarum til kappingina**

TALV

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyrra undankappingin í FM-liðkappingini fyri skúlaungdóm 2006 varð telvd Dýrabiðjudag á Oyrarbakka.

Telvað verður um FM-heitið fyri skúlanæmingar í 5. flokki og eldri og 4. flokki og yngri, og liðini eru mannað við 4 telvarum, umframt við upp til 2 skiftistelvarum á hvørjum liði.

Heili 21 lið møttu til kappingina, og tað svarar til umleið 100 ungdómar, tá skiftistelvarar verða roknaðir við. Hetta er munandi framgongd í mun til undanfarna ár, sigur Talvsamband Føroya.

Kappingin fekk eina veruliga og stak hugaliga innspræning av nýggjum kreftum. Heili 30 telvarar av Sandoynni møttu upp. Teir komu úr Skálavík, av Sandi og úr Skopun. Og javnt er býtt millum gentur og dreingir!

Hildið verður, at tað er ungdómsarbeiðið hjá talvráðgevanum, Mogens Nielsen, sum av álvara byrjar at síggjast aftur. Sandoyggin er ivaleyst eisini talvoyggin nr. 1 í løtuni, men eisini Sundalagið styrknar í hvørjum. Á fyrsta sinni luttóku børn úr Haldarsvík. Og her eru fleiri væntandi til komandi kappingar – eisini úr Tjørnuvík.

### Havnin var best

Í aldursbólkinum 5. flokkur og eldri lat Havnin ongan iva vera um, at sigurin var teirra. Roynda liðið við Hjalta Toftum Jógvansson, Margar Berg, Heiðriki Jacobsen og Jaspur Enghamar snávaði bert í tveimum talvum í kappingini og vunnu allar dystirnar ímóti hinum liðunum.

Hinvegin varð talan um spennandi kapping um 2. og 3. plássið. FM vinnararnir frá 2005, Klaksvík, dró longra stráðið um 2. plássið í harðari kapping við Sandavág. Liðini høvdu vunnið eins nógvar dystir, men Klaksvíkin megnaði at vinna fleiri talv. Kollafjørður hevði eina góða kapping og otaði seg at 3. plássinum, tó at teir gjørdist ov stuttir tá samanumkom.

### Spennandi kapping

Í aldursbólkinum 4. flokkur og yngri, gjørdist talan um eina sera spennandi og javna kapping um plaseringarnar. Kappingin stóð ímillum Sandavág, Rók, Klaksvík og Skopun. Avgerðin um 1. plássið fall í seinasta umfarinum, tá Klaksvík og Sandavágur møttust. Dysturin endaði við teprum sigri til Sandavág. Harvið hevði Sandavágur vunnið allar sínar dystir, meðan Rókur, Klaksvík og Skopun høvdu vunnið 3 hvør.

Avgerðin um 2. og 3. plássið varð síðani avgjørt við, hvør hevði flest vunnin talv, og her hevði Rókur munin. Hugaligt og sera flott av Skopun at teir gera vart við seg í fyrstu FM-royndini, nú hesir eru óroyndir í hesum høpinum. Eisini gott úrslit hjá Vestmanna – FM vinnarar 2005 – nú nýggjar kreftir eru settar við og teir meiri royndu unglingarnir eru fluttir í eldra aldursbólkin. Kollfirðingar stóðu seg somuleiðis væl. Gullvinnararnir úr Sandavági vóru mannaðir við Hørdi Johansen, Jóannes A. Nielsen, Sølva Egilsson, Janusi Egilstoft Nielsen og Høgna Egilstoft Nielsen.

Seinna FM kappingin verður í Klaksvík 25. mai kl. 12.30, meðan finalan verður í Skopun 5. juni.

Onki er til hindurs fyri, at luttaka í seinnu kappingini og í opna bólkinum í finaluni, hóast ikki varð luttikið í fyrstu kappingini.



*Hendan gentan hugsar seg væl um, áðrenn hon flytir næsta leikin*

### FM í talvi fyri skúlanæmingar

**5. flokkur og eldri:**
**Stig/vunnin talv**
1. Havnin (24) (30)
2. Klaksvík (19) (24)
3. Sandavágur (19) (21)
4. Kollafjørður (15) (18)
5. Rókur (a) (12) (13)
6. Vestmanna (a) (9) (14)
7. Vestmanna (b) (6) (10)
8. Skopun (3) (4)
9. Haldarsvík (0) (1)

**4. flokkur og yngri:**
**Stig/vunnin talv**
1. Sandavágur (12) (12)
2. Rókur (9) (11)
3. Klaksvík (9) 10)
4. Skopun (a) (9) (8)
5. Kollafjørður (6) (9)
6. Vestmanna (6) (8)
7. Havnin (5) (7)
8. Skálavík (4) (5)
9. Sandur (c) (4) (4)
10. Sandur (a) (3) (6)
11. Sandur (b) (1) (3)
12. Skopun (b) (0) (1)


## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways fer eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*



ATLANTIC AIRWAYS




**Hvar er bólturin?**
Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.